# Vilja av við oljuavgjaldið

**Sambandsflokkurin vil nú hava oljuavgjaldið tikið av fyri komandi ár**

POLITIKKUR
*Eyðun Klakstein*

Sambandsflokkurin ger nú aftur eina roynd at sleppa av við avgjaldið, sum liggur á brenniolju. Flokkurin hevur áður lagt líknandi uppskot fyri løgtingið, men tey hava ikki fingið neyðugu undirtøkuna.

Nú vil Sambandsflokkurin hava lógina um serligt avgjald á brenniolju setta úr gildið komandi ár.

– Sambandsflokkurin heldur, at tað er ein neyðugur og uppiborin lætti, hvørt einasta húski, borgari og arbeiðspláss fáa, um uppskotið verður samtykt, sigur flokkurin í viðmerkingunum til uppskotið, sum Sune Jacobsen legði fram týsdagin.

Um miðalnýtslan av olju hjá húskjum er 4000 litrar um árið, so fer uppskotið hjá Sambandsflokkinum at hava ein lætta upp á 3200 krónur við sær um árið.

## Spara olju

Sambandsflokkurin sigur, at flokkurin metir brenniolju sum neyðsynjarvøru, og at stórt avgjald tí ikki eigur at verða lagt á oljuna.

Stóri andstøðuflokkurin sigur seg eisini hugsa um umhvørvi, fyri tað um oljuavgjaldið skal takast av.

– Oljuprísurin er so mikið høgur, at øll fólk spara nógv um oljuna, sjálvt um oljuavgjaldið fellur burtur. Oljan er ríkiga dýr uttan oljuavgjald, sigur flokkurin í viðmerkingunum til uppskotið hjá sær.

Uppskotið hjá Sambandsflokkinum fær fyrstu viðgerð í løgtinginum í dag.

NØVN Í VIKUNI

# Mathea Skaale 95 ár

Í gjár, 9. august, varð Johanna Mathea Skaale í Havn 95 ár. Mathea er ættað av Trøllanesi, hon var gift Sigfred Skaale, sála, 6 vóru børnini. Tey búðu í Tvørgøtu.

Mathea hevur búð á Ellisheiminum síðan 1999.



# Útbúgvingarstuðulin broyttur



ÚTBÚGVINGARSTUÐUL
*Stuðulsstovnurin*

1. august í 1999 varð nýggj løgtingslóg um útbúgvingarstuðul sett í gildi - løgtingslóg nr. 45 frá 23. apríl 1999. Sambært nýggju lógini komu nakrar broytingar í gildi við skúlaársbyrjan í 1999, ímeðan aðrar broytingar vóru settar í gildi við skúlaársbyrjan í 2000.

## Broytingar í ár

Í ár koma eisini 3 broytingar í gildi sambært Ll nr. 60 frá 27 apríl 2001.

**Hesar eru:**

1. Dagføring av rættindum hjá útlendskum borgarum at fáa útbúgvingarstuðul í Føroyum. Hetta er sambært norðurlendskum avtalum.
2. Annar almennur stuðul forðar ikki fyri at útbúgvingarstuðul verður veittur.
3. Lánsupphæddirnar verða, á sama hátt sum studningurin, prístalsviðgjørdar.

## Stuðulshættir og -upphæddir

### Tey, ið eru 18 ár og eldri

Øll, ið eru 18 ár ella eldri fáa vanliga útbúgvingarstuðulin um tey uppfylla treytirnar.

Tey, ið verða 18 ár í stuðulsárinum, fáa stuðulin mánaðin eftir at tey eru fylt 18 ár. Tá hava hesi eisini møguleika at søkja um lán.

### Tey, ið eru undir 18 ár

Tey, ið eru undir 18 ár fáa ískoytisstuðul til keyp av undirvísingartilfari (bókastuðul). Harafturat er møguleiki hjá nøkrum av hesum næmingum at fáa ískoytisstuðul til vistarhald (vistarhaldsstuðul).

Bókastuðulin verður latin øllum næmingum, ið ikki hava fylt 18 ár innan 1. august 2001. Næmingar, ið fylla 18 ár í fyrru lestrarhálvu, tvs. fyri 1. januar fáa kr. 1.575 og teir ið fylla seinnu lestrarhálvu, tvs. 1. januar ella seinni fáa kr. 3.150. Bókastuðulin verður útgoldin fyrst í stuðulsárinum.

Vistarhaldsstuðulin verður latin avbygdanæmingum undir 18 ár, sum noyðast at flyta til útbúgvingarstaðið. Treytin fyri at fáa henda stuðul er, at sjóvegis farleið er millum heimabústað og skúlan, ella at vegalongdin millum heimabústað og skúlan er longri enn 50 km. Mánaðarligi vistarhaldsstuðulin er kr. 1.655 í 11 mánaðir. Fyri at fáa vistarhaldsstuðul skal ÚS-leiguváttan fyriliggja á sama hátt sum hjá útibúgvandi.

**Yvirlit yvir upphæddir :**

| | Stuðul um árið í 11 mðr | Stuðul um mánaðin |
|---|---|---|
| Heimabúgvandi | kr. 24.255 | kr. 2.205 |
| Útibúgvandi | kr. 36.388 | kr. 3.308 |
| Lán | kr. 23.078 | kr. 2.098 |

*Eingin útbúgvingarstuðul verður útgoldin í juli.*

### Ikki aldurstreytaður stuðul

Ferðastuðulin innanoyggja: Meginreglan í skipanini er, at allir næmingar, ið nýta Strandfaraskip Landsins, gjalda sama gjald fyri at koma í skúla, uttan mun til fjarstøðu frá skúlanum. Ásett er, at fyri 20 túrar aftur og fram millum heimabústaðin/útbúgvingar bústaðin og skúlan skal næmingurin gjalda kr. 100. Næmingurin fær útflýggja eitt elektroniskt kort, sum bert kann nýtast á eini farleið, og bert eina ferð um dagin aftur og fram í skúla. Treytin fyri at fáa ferðastuðulin er hin sama, ið er galdandi fyri at fáa útbúgvingarstuðulin.

Allir næmingar eiga at lesa »Vegleiðing til útbúgvingarstuðulin skúlaárið 2001/2001« og »Vegleiðing til ferðastuðulin innanoyggja 2001/2002«, ið fæst á skúlunum og er ein meira útgreinað frágreiðing enn henda stutta blaðgrein.

Sí annars: www.studulsstovnurin.fo



# Grundlógarnevndin veingjaskerd

*Kári á Rógvi hevur mist hugin at vera skrivari hjá grundlógarnevndini, og vil tí ikki leingja sáttmálan við landsstýrið.*



**Arbeiðið at smíða eina føroyska grundlóg hevur fingið eitt skot fyri bógvin. Orsøkin er, at skrivarin hjá nevndini ikki er sinnaður at leingja sáttmálan við landsstýrið, sum gekk út 1. august. Skrivarin hevur fingið nokk av vánaligu arbeiðsumstøðunum í Tinganesi og tímir ikki at røkja skrivstovuarbeiðið longur**

GRUNDLÓG
*Rúnar Reistrup*

Grundlógararbeiðið hevur fingið eitt rættiliga álvarsligt skot fyri bógvin. Nú minni enn tveir mánaðir eru eftir, til grundlógarnevndin skal lata eitt fyribilsuppskot úr hondum, liggur tað fast, at skrivarin í nevndini, ikki er sinnaður at leingja verandi sáttmála við landsstýrið. Sáttmálin gekk út 1. august, og grundlógarnevndin hevur tískil ongan skrivara í løtuni.

Kári á Rógvi, sum nú er fyrrverandi skrivari í grundlógarnevndini, er ikki nøgdur við tær fyrisitingarligu umstøðurnar, sum grundlógararbeiðið hevur fingið, og tí hevur hann mist hugin at halda fram sum skrivari í nevndini, sigur hann.

## Ómissandi

Formaðurin í grundlógarnevndini, Jóan Pauli Joensen, dylir ikki fyri, at tað er sera óheppið fyri arbeiðið hjá nevndini, at skrivarin ikki hevur hug at halda fram, tí skrivarin liggur inni við nógvari vitan, ið er alneyðug í framhaldandi arbeiðinum, og tí er tað ikki bara sum at siga tað, at lata mann koma í manns stað.

– Tað harmar meg sum formann í nevndini, at skrivarin ikki ynskir at halda fram, men tað mugu vit royna at finna eina loysn á. Ein møguleiki hevði verið, at fyrrverandi skrivarin framhaldandi gjørdist ein partur av grundlógararbeiðinum, men at hann hevði ein annan leiklut enn sum skrivari. Tí tað er greitt, at tað verður ómetaliga torført at klára seg uttan hann, sigur Jóan Pauli Joensen.

## Fæst ikki í starvið aftur

Landsstýrismaðurin við sjálvstýrismálum, Høgni Hoydal, arbeiðir í løtuni av øllum alvi fyri at finna eina loysn á skrivaraloysinum hjá grundlógarnevndini. Tí tað hevur skund at fáa arbeiðið hjá grundlógarnevndini í gongd aftur, um eitt fyribilsuppskot skal vera klárt 1. oktober. Og tað skal tað sambært løgtingslógini um grundlógarnevnd, ið varð samtykt á tingi 11. februar 1999 og broytt 26. apríl í ár.

Landsstýrismaðurin hevur skift orð við fyrrverandi skrivaran í grundlógarnevndini fleiri ferðir hesa vikuna og roynt at fingið hann at hildið fram, men til onga nyttu. Nú arbeiðir landsstýrismaðurin við einari aðrari loysn sum inniber at skrivarin á onkran annan hátt skal halda fram at vera ein partur av arbeiðinum at smíða eina føroyska grundlóg.

## Einki ímóti grundlógararbeiðinum

Fráfarni skrivarin, Kári á Rógvi, sigur seg als einki hava ímóti grundlógararbeiðinum sum heild, tvørturímóti.

– Eg haldi at grundlógararbeiðið er ómetaliga spennandi. At síggja hvussu nær føroyskir politikarar í veruleikanum eru at eini semju um eina føroyska stjórnarskipan, og at vera partur av hesi tilgongd er sera spennandi, sigur Kári á Rógvi.

– Men eg tími ikki skrivstovuarbeiðið longur. At sita og ringja til allar nevndarlimirnar, og avtala fundir við teir, avlýsa fundir aftur, kopiera pappírir til fundaluttakarnar, skaffa fundarhøli og gera kaffi er ikki tað, sum eg leggi í at vera løgfrøðingur og skrivari hjá grundlógarnevndini. Tað gongur út yvir tann fakliga partin, og tað er har trupulleikin liggur. Tey lyfti, sum eg havi fingið um betraðar umstøður, eru ikki hildin. Tí kann eg ikki halda fram sum skrivari. Eg havi ikki mist hugin til grundlógararbeiðið, men bert til sjálvt skrivstovuarbeiðið, sigur Kári á Rógvi.

Hann er tískil klárur at taka ímóti einum tilboði um at gerast partur av grundlógararbeiðinum á annan hátt enn sum skrivari.

## Brotin lyftir

Fyrrverandi skrivarin í grundlógarnevndini gjørdi av álvara vart við sína ónøgd fyri hálvum árii síðan, tá sáttmálin við landsstýrið eisini skuldi endurnýggjast. Tá var úrslitið, at formaðurin í grundlógarnevndini og landsstýrismaðurin feldu eina sonevnda »felags fatan« í átta punktum niður á pappír. Í hesi felags fatan var millum annað nevnt, hvørjar umstøður grundlógarnevndin skuldi hava at arbeiða undir. Men hesar umstøður eru enn ikki betraðar í tann mun, at tær eru blivnar nøktandi, sambært Kára á Rógvi.

– Tí kann eg ikki bjóða mær sjálvum at bara góðtaka at so er, og so halda fram sum fyrr. Felagsfatanin bleiv ikki hildin, Tað, sum bleiv lovað har, um at eg skuldi hava tveir hálvar løgfrøðingar, eg skuldi hava skrivstovufólk, og eg skuldi hava eina konto á fíggjarlógini til grundlógararbeiðið, og at tingmenn skuldu fáa betri umstøður at møta á fundi, soleiðis at grundlógararbeiðið var innarbeitt í kalendaran hjá løgtinginum, er ikki hildið.

– Væntandi var, at tær størstu forðingarnar í arbeiðinum fóru at vera tær politisku. At fáa politkararnar frá øllum síðum at arbeiða konstruktivt saman. Men hesin parturin hevur gingið ómetaliga væl. Hinvegin hevur tað gingið ómetaliga illa at fáa tann fyrisitingarliga partin at virka, og tað er sera harmiligt, haldi eg, sigur Kári á Rógvi, fyrrverandi skrivari í grundlógarnevndini.

Grundlógararbeiðið er tað mest umfatandi lógarsmíðið higartil í føroyskari søgu.

